

**Martin Zachariasen**
*formaður í Granskingarnevndini*

# Skapið karmar og setið krøv – og vísið okkum álit

*Nýggja Vísindaráðið hevur nú virkað í næstan hálvt annað ár, men enn er onki uppskot til granskingarpolitikk lagt fram fyri almenningin.*



Høvuðsuppgávan hjá Føroya Vísindaráði, har løgmaður er formaður, er at »orða yvirskipaða granskingarpolitikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan«.

Hesin granskingarpolitikkurin skal siga, hvussu politikararnir ynskja at føroyska »landslagið« fer at síggja út komandi 5-10 árini, tá ið tað kemur til gransking, menning og nýskapan. Politikkurin snýr seg m.a. um leiklutin hjá Fróðskaparsetri Føroya og hinum undirvísingar- og granskingarstovnunum, um granskarapark og/ella universitetskampus og hvussu játtanir til hesar granskingarstovnar og -grunnar skulu fyriskipast. Hetta eru sostatt spurningar, sum ávirka allar partar av føroyska granskingar- og menningarumhvørvinum, herundir samspælið við ES og restina av útheiminum.

Á fyrsta fundinum í Vísindaráðnum, sum var tann 28. november 2008, var breið semja um, at hóast vánaliga fíggjarstøðu – og kanska serliga orsakað av fíggjarstøðuni – var neyðugt at satsa miðvíst og munandi uppá gransking, menning og nýskapan.

**Tað er luturin og lagnan hjá einum lítlum landi at alt er avmarkað og smátt**

Granskingarnevndin og Vísindaráðið hava tískil viðgjørt hendan spurningin á flestu fundunum síðani ársskiftið 2008/2009. Í september 2009 gjørdi Granskingarnevndin endaligt uppskot til føroyskan granskingarpolitikk. Uppskotið skuldi góðkennast á fyrstkomandi fundi í Vísindaráðnum, men tíverri varð ætlaði fundurin í oktober 2009 avlýstur, og síðani hevur eingin fundur verið.

Okkara universitet, søvn, granskingarstovnar og –umhvørvi eru smá. Somuleiðis eru privatar fyritøkur, ið leggja seg eftir at skapa karmar um menning og nýskapan. Tað er luturin og lagnan hjá einum lítlum landi at alt er avmarkað og smátt, men fyri tað er tað alneyðugt at politiska skipanin sær til at skapa fólkavøkstur og ikki minst trivna. Fólkavøkstur og trivnaður verður, tá ið ung vísindafólk og granskarar – talentini innan- og uttanlands, trúgva uppá eina føroyska framtíð. Uttan ein føroyskan granskingarpolitikk og eina ítøkiligari ætlan missir føroyska granskingar- og menningarumhvørvið – og ikki minst tey ungu – trúnna uppá, at politiska skipanin vil nakað ítøkiligt við føroyskari gransking, menning og nýskapan.

Vit heita á politisku skipanina um at tekna eina visión, at skapa bygnaðarligar og fíggjarligar karmar, at seta krøv og at raðfesta – og hereftir vísa granskarunum álit. Vit ynskja øll tað sama: At skapa vitan og framburð fyri føroyska samfelagið.



**Steinbjørn O. Jacobsen**

# Hvar eru nú negativu røddirnar, um íløguna í Norðhavnina ?

Hetta er ein rámandi yvirskrivt, men veruleikin er, at tað hava verið ómetaliga nógvar røddir upp gjøgnum árini, eisini millum býráðslimir, sum hava hildið lítið um at gera so stórar íløgur í Góðshavnina í Ánum, sum vit kallaðu hana, áðrenn hon fekk endaliga navnið »Norðhavnin«.

Vit eru vóru eisini greið yvir, at íløgan ikki fór at geva av sær fyrstu tíðina, men nú at síggja alt virksemið í nýggju havnini má verða ein beiskur bitið hjá teimum, sum lítið hildu um ætlanina og høvdu vánaligar spádómar á lofti, men søtt hjá okkum, sum arbeiddu hart fyri hesum. Kann ikki lata vera við at nevna Tórleif Sigurðsson sála, sum brendi fyri Havnini á Ánum, tað hevði frøtt hann at sæð lívið har norðuri.

Eg má siga sum er, at eg eri ómetaliga fegin, sum fyrrverandi borgarstjóri, at vit høvdu dirvi at halda fast um ætlanina og føra hana út í lívið, ja, enntá gera hana væl størri enn upprunaliga. Tí longu nú tykist havnin verða ov lítil til alt virksemið, sum er har í løtuni. Í fyrstuni var bert ætlanin at atløgusíðan skuldi verða 150 metrar, men í dag er atløgusíðan meir enn tað dupulta, nevniliga 317 metrar.

Nú kunnu fleiri russisk og onnur skip umskipa veiðuna í farmaskip, meðan okkara stóru fiskiskip kunnu leggja veiðuna upp samstundis.

### Frystihúsið ein fongur fyri virksemiðá staðnum

Tað, sum ger stóra munin í virkseminum, er nýggja Frystihúsið, sum Klaksvíkar Býráð var stóri viðspælari í, tá ætlanin kom fram, eg dugi ikki at ímynda mær Norðhavnina uttan frysti- og goymsluhús. Um Klaksvíkar Kommuna ikki luttók í at gera betongsokkilin o. a. undir bygninginum, kom onki hús, hóast ikki allir býráðslimirnir tóku undir við hesum, bleiv tað samtykt og felt inn í leigusáttmálan millum partarnar, at kommununar partur verður afturgoldin innan ávíst áramál, soleiðis fingu vit henda sera týdningarmikla bygning upp at standa, og sum nú er við til at skapa fleiri arbeiðspláss á landi og harafturat karmar skaptir, so skipini kunnu landa til húsið, hetta gevur eisini avleiddu vinnuni á staðnum nógv arbeiði.

### Longu nú kastar Norðhavnin av sær, so tað eisini munar í kommunukassanum.

Tað er at fegnast um, at Norðhavnin í Ánum longu er farin at kasta av sær fíggjarilga, tí umframt skattakrónurnar sum koma til kommununa av tí virksemi, sum er skapt har, fær Klaksvíkar Havn eisini sínar meirinntøkur av teim skipum, sum leggja at har, og henda inntøkan hevur verið vaksandi seinastu tíðina. Klaksvíkar kommuna má hava onnur bein at standa á, enn bert skattakrónur, tí eiga vit at leggja alla orku í at marknaðarføra Klaksvíkar Havn enn meiri, so inntøkurnar kunnu økjast enn meira.